


## Umhvørvisstovan søkir starvsfólk til deildina Vernd at savna og viðgera dátur um náttúru og umhvørvi, og at skipa fyri viðkomandi gransking

Vit virka fyri at fyribyrgja og avmarka dálking og at varðveita margfeldið í føroysku náttúruni. Vitan um føroyska náttúru og umhvørvi er fremsta grundarlagið undir okkara arbeiði. Tí fara vit miðvíst undir at savna, skráseta og greina vitan um føroyska umhvørvið og at fremja gransking, sum stuðlar undir okkara arbeiði.

### Starvið

Arbeiðið snýr seg m.a. um at

- standa fyri og samskipa eitt dátusavn um føroyska náttúru og umhvørvi, t.e. plantur, dýr, dálking, lendi o.a.,
- kanna, hvør vitan finst um føroyska náttúru og umhvørvi hjá vitanarstovnum o.ø. í Føroyum og uttanlands. Kanna í hvørjum líki henda vitan er, og í hvønn mun hon er ella kann gerast tøk,
- skráseta og viðgera tøka vitan,
- miðla tøka vitan til starvsfelagar, stovnar, borgarar o.o.,
- lýsa tørvin á nýggjari vitan,
- skipa fyri og fremja viðkomandi gransking,
- luttaka í viðkomandi gransking á Umhvørvisstovuni, t.d. AMAP

### Førleikar

Tú hevur hægri útbúgving og granskingarførleikar innan náttúru ella umhvørvi. Tú hevur dyggar royndir í at arbeiða við dátugrunnum og at viðgera og greina náttúrudátur. Tú ert fjølbroytt(ur) og kanst útinna ymiskar uppgávur.

Tú dugir væl at samskifta í skrift og talu á føroyskum, norðurlendskum og enskum.

## Setanarviðurskifti

Starvið er fulltíðarstarv at byrja skjótast gjørligt.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya, ella annað viðkomandi yrkisfelag. Arbeiðsstaður er Umhvørvisstovan.

## Umsókn

Umsókn, saman við prógvum og viðkomandi skjølum skal vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 20. februar 2019, og sendast til

starv@us.fo

ella sum bræv til

Umhvørvisstovuna,
Traðagøta 38
Postboks 2048
165 Argir

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Suna Petersen, deildarleiðara á Vernd, teldupostur SuniP@us.fo, tlf. 234344 ella Petur Nielsen, stjóra, teldupostur PeturN@us.fo, tlf. 234370.